gult30 cyan30 magenta30 svart30



# Jugoslavar liggja framvið



*Jugoslavar kunnu nú aftur sjálvir gera av, um teir skulu vera við, tá farið verður undir HM-endaspælið komandi ár*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Eftir eina stak ringa byrjan upp á undankappingina, hevur Jugoslavia nú kortini góðar møguleikar at tryggja sær luttøku í HM-endaspælinum**

HM-UNDANKAPPING

*Jákup Mørk*

Eftir trivaliga sigurin á Føroyum, tykjast jugoslavar nú brádliga at fóta sær í bólki eitt í undankappingini til HM. Ikki minst tí Slovenia á útivølli vann ein heldur óvæntaðan sigur á Sveis.

Jugoslavar hava framvegis tvey stig upp til Slovenia á øðrum plássi, men minnast skal til, at Slovenia misti tvey stig á Svangaskarði í fjør, og tað kann tí tykjast, at Jugoslavar eru liðið, sum hava vunnið mest, við at hava Føroyar í sínum bólki. Bæði orsaka av stignum, sum vit fingu móti Slovenum, og tí málúrtøkan hjá Jugoslavia batnaði heilt nógv eftir føroyavitjanina.

Undir øllum umstøðum hevur tað nú laga seg soleiðis, at jugoslavar sjálvir sita við lyklinum, tá tosast skal um atgongd til næst ovasta sessin í bólkinum. Eftir at teir í august skulu avgreiða útsetta dystin móti Føroyum, skulu teir fyrst vitja í Sveis, áðrenn Slovenia kemur á vitjan. Ein javnleikur í Sveis og sigur á heimavølli móti slovenum eru tí helst nóg mikið hjá Jugoslavia, treytað av at talan verður um sigrar, tá Føroyar og Luksemburg vitja.

# Føroya Bjór renning á Norðoyastevnu

**Fimta ári á rað skipar felagið fyri frælsan ítrótt í Klaksvík, Treysti, fyri norðoyastevnurenning**

RENNING

*tíðndaskriv*

Eins og undanfarin ár skipar Ítróttafelagið TREYSTI fyri árligu Føroya Bjór renningini á norðoyastevnu. Henda rennikapping er nú vorðin ein fastur táttur í leygardagsskránni á norðoyastevnu, og er hetta fimta ári á rað, at runnið verður í Miðbýnum. Í 1999 og 2000 luttøku umleið 120 børn og vaksin, og í fjør; tá firmastaffet var við fyri fyrstu ferð, vóru umleið 140 luttakarar. Sostatt kann ikki sigast annað enn, at rennikappingin hevur fingið góða undirtøku, og vóna fyrireikarnir úr Treystinum, at luttøkan verður eins góð í ár. Runnið verður sum vant leygardagin, og verður rutan at renna hin sama. T.v.s. eftir Skúlavegi, Gerðagøtu og Biskupsstøðgøtu. Byrjan og mál verða við Telefonstøðina.

Skráin fyri rennikappingina sær soleiðis út:

| Kl. | Aldursbólkur | Umfør | Teinur |
|---|---|---|---|
| 12.00 | Vaksin 13 ár og eldri | 7 | 5 km |
| 12.30 | Børn undir skúlaaldur | 1 | 675m |
| 12.45 | Børn í skúlaaldri til og við 12 ár | 2 | 1.350 m |
| 13.00 | Firma-staffet | | |
| (3 luttakarir, 1 umfar í part) | | 1 x 3 | 675 x 3 |
| 13.15 | Heiðursmerkjahandan og lutakast | | |

Aldurbólkar og teinar eru teir somu sum í fjør. Einasta broyting er, at tey vaksnu renna fyrst. Børn undir skúlaaldur renna eitt umfar, meðan børn í skúlaaldri til og við 12 ár renna tvey umfør. Tey vaksnu byrja við Talvhúsið og renna 5 km. Kappingin hjá teimum vaksnu er samstundis 3. umfar í Grand Prix kappingini sum DSF (Deildarsambandið fyri Súkkling og Frælsan ítrótt) skipar fyri.

## Firma-stafett

Aftur í ár verður roynt at skipa fyri "firma-staffet". Seinasta ár eydnaðist hon so mikið væl, at roynt verður aftur í ár. Tríggir luttakarir (menn/kvinnur) frá sama firma renna eitt umfar í part tvs. 675 m.

Fyrsti luttakari á liðnum byrjar og rennur eitt umfar, næsti luttakari stendur klárur á málinum, fær eitt klapp frá tí fyrsta og rennur síðani avstað, triðji og seinasti luttakari stendur klárur og fær eitt klapp frá tí næsta og rennur síðani avstað, og tá hann kemur á mál er alt liðið komið á mál. Tvs. at 3. maður er avgerandi fyri hvussu liðið klárar seg. Best er, um teir 3 luttakarnir frá sama firma hava eins troyggjur at renna í, so tað verður léttari at halda skil á skiftum. Virkir, stovnar o.l. kunnu tilmelda eitt ella fleiri lið á tríggjar rennarir.

## Heiðursmerki og steyp

Tá seinasti rennarin er komin á mál, og úrslitini eru greið, verða heiðursmerkir handað til trý tey fremstu hjá bæði gentum og dreingjum í báðum aldursbólkum, meðan tað hjá teimum vaksnu verður latið steyp til vinnaran hjá kvinnum og monnum og heiðursmerkir til nr. tvey og trý. Vinnandi stafett-liðið fær steyp til ognar, umframt at nr. tey trý fremstu liðini fáa heiðursmerkir. Okkurt leskiligt verður at fáa frá Føroya Bjór, umframt at lutakast verður ímillum allar luttakarnar um gávur frá stuðlum.

## Tilmeldan

Tilmelding fer fram við Telefonstøðina í seinasta lagi hálvan tíma áðrenn kappingirnar byrja. Allir lluttakarir verða tó bidnir um at møta við Telefonstøðina og tilmelda seg í góðari tíð áðrenn renningin byrjar. Luttøkugjaldi er kr. 20 fyri børn, kr. 30 fyri vaksin og kr. 100 fyri firmastaffet. Øll eru vælkomin at verða við og vóna fyrireikarnir at undirtøkan verður minst líka góð sum seinasta ár.



*Á myndini sæst kort, sum sýnir rutuna, sum rennast skal eftir á norðoyastevnu*

# Svimjigenturnar skoraðu

**Heidi Andreasen og Esther Gaard Hansen vunnu hópin av heiðursmerkjum, tá tær um vikuskifitð kappaðust í sterkari kapping í Sheffield**

SVIMJING

*Tíðndaskriv*

Um vikuskiftið hava Esther Gaard Hansen og Heidi Andreasen verið til altjóða kapping í Sheffield, Onglandi. Umleið 300 svimjarar úr 10 ymiskum londum luttóku. Í fjør var hetta seinasta styrkisroyndin undan Paraolympisku leikunum í Sydney, og tá var kappingin enn sterkari, enn hon var í ár. Kappingin í ár var tó eisini hørð, tí fyri flestu svimjararnar varð hetta nýtt sum seinasta styrkisroyndin undan EM, sum verður í Stockhol í døgunum 31. juli til 6. august.

Kappingin er soleiðis háttað, at stig verða latin fyri heiðursmerki, og trý tey fremstu londini í so máta vóru Bretland, Póland og Danmark.

Hesaferð var tað serliga Esther, sum betraði um sínar tíðir. Hon vann vann eisini eitt gullmerki, eitt silvur- og eitt bronsumerki. Eisini gjørdist hon nummar fýra í 400 metra bringusvimjing.

Heidi stóð seg serliga væl í 50+ og 100 metra frísvimjing, og í alt vann hon fýra gull- og eitt silvurmerki.

Sum tað framgongur av úrslitunum niðanfyri, so stóðu føroysku svimjararnir seg sera væl. Til EM kann tó roknast við, at kappingin verður væl harðari, tí í Sheffield restaðu hóast alt nakrir av sterkastu europeisku svimjarunum.

Fram til EM halda Heidi og Esther á fram at vena fram til 20. juli, áðrenn seinastu fyrireikingarnar verða gjørdar á venjingarlegu á Sisilia, har tær skulu venja saman við danska svimjilandsliðnum.

**Úrslitini í Sheffield:**

100 m firvald

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Esther Gaard Hansen | Føroyar | 1.28,00 |
| 2 | Syreeta v. Amelsvoort | Holland | 1.31,27 |
| 3 | Aneta Michalska | Póland | 1.31,65 |

200 m blandað

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Heidi Andreasen | Føroyar | 3.09,8 |
| 2 | Esther Gaard Hansen | Føroyar | 3.10,93 |
| 3 | Aneta Michalska | Póland | 3.15,07 |

400 m frí

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Heidi Andreasen | Føroyar | 5.28,73 |
| 2 | Aneta Michalska | Póland | 5.46,16 |
| 3 | Magda Jaroslawska | Póland | 5.46,29 |

100 m frí

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Heidi Andreasen | Føroyar | 1.11,43 |
| 2 | Aneta Michalska | Póland | 1.17,43 |
| 2 | Cesilie Drabsch | Noreg | 1.17,82 |

50 m frí

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Heidi Andreasen | Føroyar | 0.33,00 |
| 2 | Cesilie Drabsch | Noreg | 0.33,97 |
| 3 | Pernille Thomsen | Danmark | 0.34,18 |

100 m rygg

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Chantal Boonacher | Holland | 1.26,65 |
| 2 | Heidi Andreasen | Føroyar | 1.27,23 |
| 3 | Esther Gaard Hansen | Føroyar | 1.34,08 |

gult31 cyan31 magenta31 svart31



# Úrslit og støður í europeisku undankappingini HM 2002

## Bólkur 1

Úrslit

| | | |
|---|---|---|
| 02-09-00 | Sveis-Russland | 0-1 |
| 03-09-00 | Føroyar-Slovenia | 2-2 |
| 03-09-00 | Luksemburg-Jugoslavia | 0-2 |
| 07-10-00 | Luksemburg-Slovenia | 1-2 |
| 07-10-00 | Sveis-Føroyar | 5-1 |
| 11-10-00 | Russland-Luksemburg | 3-0 |
| 11-10-00 | Slovenia-Sveis | 2-2 |
| 24-03-01 | Jugoslavia-Sveis | 1-1 |
| 24-03-01 | Russland-Slovenia | 1-1 |
| 24-03-01 | Luksemburg-Føroyar | 0-2 |
| 28-03-01 | Russland-Føroyar | 1-0 |
| 28-03-01 | Sveis-Luksemburg | 5-0 |
| 28-03-01 | Slovenia-Jugoslavia | 1-1 |
| 25-04-01 | Jugoslavia-Russland | 0-1 |
| 02-06-01 | Russland-Jugoslavia | 1-1 |
| 02-06-01 | Føroyar-Sveis | 0-1 |
| 02-06-01 | Slovenia-Luksemburg | 2-0 |
| 06-06-01 | Sveis-Slovenia | 0-1 |
| 06-06-01 | Luksemburg-Russland | 1-2 |
| 06-06-01 | Føroyar-Jugoslavia | 0-6 |

Komandi dystir

| | |
|---|---|
| 15-08-01 | Jugoslavia-Føroyar |
| 01-09-01 | Sveis-Jugoslavia |
| 01-09-01 | Slovenia-Russland |
| 01-09-01 | Føroyar-Luksemburg |
| 05-09-01 | Jugoslavia-Slovenia |
| 05-09-01 | Luksemburg-Sveis |
| 05-09-01 | Føroyar-Russland |
| 06-10-01 | Jugoslavia-Luksemburg |
| 06-10-01 | Russland-Sveis |
| 06-10-01 | Slovenia-Føroyar |

## Bólkur 2

Úrslit

| | | |
|---|---|---|
| 16-08-00 | Estland-Andorra | 1-0 |
| 02-09-00 | Andorra-Kypern | 2-3 |
| 02-09-00 | Holland-Írland | 2-2 |
| 03-09-00 | Estland-Portugal | 1-3 |
| 07-10-00 | Portugal-Írland | 1-1 |
| 07-10-00 | Andorra-Estland | 1-2 |
| 07-10-00 | Kypern-Holland | 0-4 |
| 11-10-00 | Írland-Estland | 2-0 |
| 11-10-00 | Holland-Portugal | 0-2 |
| 15-11-00 | Kypern-Andorra | 5-0 |
| 14-02-01 | Portugal-Andorra | 3-0 |
| 24-03-01 | Andorra-Holland | 0-5 |
| 24-03-01 | Kypern-Írland | 0-4 |
| 28-03-01 | Portugal-Holland | 2-2 |
| 28-03-01 | Kypern-Estland | 2-2 |
| 28-03-00 | Andorra-Írland | 0-3 |
| 25-04-01 | Holland-Kypern | 4-0 |
| 25-04-01 | Írland-Andorra | 3-1 |
| 02-06-01 | Írland-Portugal | 1-1 |
| 02-06-01 | Estland-Holland | 2-4 |
| 06-06-01 | Estland-Írland | 0-2 |
| 06-06-01 | Portugal-Kypern | 6-0 |

Komandi dystir

| | |
|---|---|
| 15-08-01 | Estland-Kypern |
| 01-09-01 | Andorra-Portugal |
| 01-09-01 | Írland-Holland |
| 05-09-01 | Holland-Estland |
| 05-09-01 | Kypern-Portugal |
| 06-10-01 | Holland-Andorra |
| 06-10-01 | Portugal-Estland |
| 06-10-01 | Írland-Kypern |

## Bólkur 3

Úrslit

| | | |
|---|---|---|
| 02-09-00 | Norðurírland-Malta | 1-0 |
| 02-09-00 | Ísland-Danmark | 2-1 |
| 02-09-00 | Bulgaria-Kekkia | 0-1 |
| 07-10-00 | Bulgaria-Malta | 3-0 |
| 07-10-00 | Norðurírland-Danmark | 1-1 |
| 07-10-00 | Kekkia-Ísland | 4-0 |
| 11-10-00 | Ísland-Norðurírland | 1-0 |
| 11-10-00 | Danmark-Bulgaria | 1-1 |
| 11-10-00 | Malta-Kekkia | 0-0 |
| 24-03-01 | Norðurírland – Kekkia 0-1 | |
| 25-03-01 | Bulgaria-Ísland | 2-1 |
| 25-03-01 | Malta-Danmark | 0-5 |
| 28-03-01 | Kekkia-Danmark | 0-0 |
| 28-03-01 | Bulgaria-Norðurírland | 4-3 |
| 25-04-01 | Malta-Ísland | 1-4 |
| 02-06-01 | Ísland-Malta | 3-0 |
| 02-06-01 | Norðurírland – Bulgaria | 0-1 |
| 02-06-01 | Danmark-Kekkia | 2-1 |
| 06-06-01 | Ísland-Bulgaria | 1-1 |
| 06-06-01 | Danmark-Malta | 2-1 |
| 06-06-01 | Kekkia-Norðurírland | 3-1 |

Komandi dystir

| | |
|---|---|
| 01-09-01 | Ísland-Kekkia |
| 01-09-01 | Malta-Bulgaria |
| 01-09-01 | Danmark-Norðurírland |
| 05-09-01 | Kekkia-Malta |
| 05-09-01 | Bulgaria-Danmark |
| 05-09-01 | Norðurírland - Ísland |
| 06-10-01 | Kekkia-Bulgaria |
| 06-10-01 | Danmark-Ísland |
| 06-10-01 | Malta-Norðurírland |

## Bólkur 4

Úrslit

| | | |
|---|---|---|
| 02-09-00 | Turkaland-Moldova | 2-0 |
| 02-09-00 | Aserbadjan-Svøríki | 0-1 |
| 03-09-00 | Slovakia-Makedonia | 2-0 |
| 07-10-00 | Makedonia-Aserbadjan | 3-0 |
| 07-10-00 | Svøríki-Turkaland | 1-1 |
| 07-10-00 | Moldova-Slovakia | 0-1 |
| 11-10-00 | Slovakia-Svøríki | 0-0 |
| 11-10-00 | Aserbadjan-Turkaland | 0-1 |
| 11-10-00 | Moldova-Makedonia | 0-0 |
| 24-03-01 | Svøríki-Makedonia | 1-0 |
| 24-03-01 | Turkaland-Slovakia | |
| 24-03-01 | Aserbadjan-Moldova | 0-0 |
| 28-03-01 | Moldova-Svøríki | 0-2 |
| 28-03-01 | Slovakia-Aserbadjan | 3-1 |
| 28-03-01 | Makedonia-Turkaland | 1-2 |
| 02-06-01 | Turkaland-Aserbadjan | 3-0 |
| 02-06-01 | Makedonia-Moldova | 2-2 |
| 02-06-01 | Svøríki-Slovakia | 2-0 |
| 06-06-01 | Turkaland-Makedonia | 3-3 |
| 06-06-01 | Svøríki-Moldova | 6-0 |
| 06-06-01 | Aserbadjan-Slovakia | 2-0 |

Komandi dystir

| | |
|---|---|
| 01-09-01 | Makedonia-Svøríki |
| 01-09-01 | Moldova-Aserbadjan |
| 01-09-01 | Slovakia-Turkaland |
| 05-09-01 | Turkaland-Svøríki |
| 05-09-01 | Slovakia-Moldova |
| 05-09-01 | Aserbadjan-Makedonia |
| 07-10-01 | Makedonia-Slovakia |
| 07-10-01 | Moldova-Turkaland |
| 07-10-01 | Svøríki-Aserbadjan |

## Bólkur 5

Úrslit

| | | |
|---|---|---|
| 02-09-00 | Noreg-Armenia | 0-0 |
| 02-09-00 | Hvítarussland-Wales | 2-1 |
| 02-09-00 | Ukraina-Póland | 1-3 |
| 07-10-00 | Wales-Noreg | 1-1 |
| 07-10-00 | Armenia-Ukraina | 2-3 |
| 07-10-00 | Póland-Hvítarussland | 3-1 |
| 11-10-00 | Póland-Wales | 0-0 |
| 11-10-00 | Noreg-Ukraina | 0-1 |
| 11-10-00 | Hvítarussland-Armenia | 2-1 |
| 24-03-01 | Ukraina-Hvítarussland | 0-0 |
| 24-03-01 | Noreg-Póland | 2-3 |
| 24-03-01 | Armenia-Wales | 2-2 |
| 28-03-01 | Póland-Armenia | 4-0 |
| 28-03-01 | Wales-Ukraina | 1-1 |
| 28-03-01 | Hvítarussland-Noreg | 2-1 |
| 02-06-01 | Armenia-Hvítarussland | 0-0 |
| 02-06-01 | Wales-Póland | 1-2 |
| 02-06-01 | Ukraina-Noreg | 0-0 |
| 06-06-01 | Noreg-Hvítarussland | 1-1 |
| 06-06-01 | Ukraina-Wales | 1-1 |
| 06-06-01 | Armenia-Póland | 1-1 |

Komandi dystir

| | |
|---|---|
| 01-09-01 | Hvítarussland-Ukraina |
| 01-09-01 | Wales-Armenia |
| 01-09-01 | Póland-Noreg |
| 05-09-01 | Ukraina-Armenia |
| 05-09-01 | Hvítarussland-Póland |
| 05-09-01 | Noreg-Wales |
| 06-10-01 | Wales-Hvítarussland |
| 06-10-01 | Armenia-Noreg |
| 06-10-01 | Póland-Ukraina |

## Bólkur 6

Úrslit

| | | |
|---|---|---|
| 02-09-00 | Letlan-Skotland | 0-1 |
| 02-09-00 | Belgia-Kroatia | 0-0 |
| 07-10-00 | Letland-Belgia | 0-4 |
| 07-10-00 | San Marino-Skotland | 0-2 |
| 11-10-00 | Kroatia-Skotland | 1-1 |
| 15-11-00 | San Marino-Letland | 0-1 |
| 14-02-01 | Belgia-San Marino | 10-1 |
| 24-03-01 | Kroatia-Letland | 4-1 |
| 24-03-01 | Skotland-Belgia | 2-2 |
| 28-03-01 | Skotland-San Marino | 4-0 |
| 25-04-01 | Letland-San Marino | 1-1 |
| 02-06-01 | Kroatia-San Marino | 4-0 |
| 02-06-01 | Belgia-Letland | 3-1 |
| 06-06-01 | Letland-Kroatia | 0-1 |
| 06-06-01 | San Marino-Belgia | 1-4 |

Komandi dystir

| | |
|---|---|
| 01-09-01 | Skotland-Kroatia |
| 05-09-01 | San Marino-Kroatia |
| 05-09-01 | Belgia-Skotland |
| 06-10-01 | Kroatia-Belgia |
| 06-10-01 | Skotland-Letland |

## Bólkur 7

Úrslit

| | | |
|---|---|---|
| 02-09-00 | Bosnia-Hersegovina-Spania | 1-2 |
| 03-09-00 | Ísrael-Liktinstein | 2-0 |
| 07-10-00 | Liktinstein-Eysturríki | 0-1 |
| 07-10-00 | Spania-Ísrael | 2-0 |
| 11-10-00 | Ísrael-Bosnia-Hersegovina | 3-1 |
| 11-10-00 | Eysturríki-Spania | 1-1 |
| 24-03-01 | Bosnia-Hersegovina-Eysturríki | 1-1 |
| 24-03-01 | Spania-Liktinstein | 5-0 |
| 28-03-01 | Liktinstein-Bosnia -Hersegovina | 0-3 |
| 28-03-01 | Eysturríki-Ísrael | 2-1 |
| 25-04-01 | Eysturríki-Liktinstein | 2-0 |
| 02-06-01 | Spania-Bosnia-Hersegovina | 4-1 |
| 02-06-01 | Liktinstein-Ísrael | 0-3 |
| 06-06-01 | Ísrael-Spania | 1-1 |

Komandi dystir

| | |
|---|---|
| 01-09-01 | Bosnia-Hersegovina-Ísrael |
| 01-09-01 | Spania-Eysturríki |
| 05-09-01 | Liktinstein-Spania |
| 05-09-01 | Eysturríki-Bosnia-Hersegovina |
| 07-10-01 | Ísrael-Eysturríki |
| 07-10-01 | Bosnia-Hersegovina-Liktinstein |

## Bólkur 8

Úrslit

| | | |
|---|---|---|
| 03-09-00 | Rumenia-Litava | 1-0 |
| 03-09-00 | Ungarn-Italia | 2-2 |
| 07-10-00 | Litava-Georgia | 0-4 |
| 07-10-00 | Italia-Rumenia | 3-0 |
| 11-10-00 | Litava-Ungarn | 1-6 |
| 11-10-00 | Italia-Georgia | 2-0 |
| 24-03-01 | Ungarn-Litava | 1-1 |
| 24-03-01 | Rumenia-Italia | 0-2 |
| 28-03-01 | Georgia-Rumenia | 0-2 |
| 28-03-01 | Italia-Litava | 4-0 |
| 02-06-01 | Rumenia-Ungarn | 2-0 |
| 02-06-01 | Georgia-Italia | 1-2 |
| 06-06-01 | Litava-Rumenia | 1-2 |
| 06-06-01 | Ungarn-Georgia | 4-1 |

Komandi dystir

| | |
|---|---|
| 01-09-01 | Georgia-Ungarn |
| 01-09-01 | Litava-Italia |
| 05-09-01 | Georgia-Litava |
| 05-09-01 | Ungarn-Rumenia |
| 06-10-01 | Italia-Ungarn |
| 06-10-01 | Rumenia-Georgia |

## Bólkur 9

Úrslit

| | | |
|---|---|---|
| 02-09-00 | Finnland-Albania | 2-1 |
| 02-09-00 | Týskland-Grikkaland | 2-0 |
| 07-10-00 | Grikkaland-Finnland | 1-0 |
| 07-10-00 | Ongland-Týskland | 0-1 |
| 11-10-00 | Albania-Grikkaland | 2-0 |
| 11-10-00 | Finnland-Ongland | 0-0 |
| 24-03-01 | Ongland-Finnland | 2-1 |
| 24-03-01 | Týskland-Albania | 2-1 |
| 28-03-01 | Albania-Ongland | 1-3 |
| 28-03-01 | Grikkaland-Týskland | 2-4 |
| 02-06-01 | Grikkaland-Albania | 1-0 |
| 02-06-01 | Finnland-Týskland | 2-2 |
| 06-06-01 | Grikkaland-Ongland | 0-2 |
| 06-06-01 | Albania-Týskland | 0-2 |

Komandi dystir

| | |
|---|---|
| 01-09-01 | Týskland-Ongland |
| 01-09-01 | Albania-Finnland |
| 05-09-01 | Ongland-Albania |
| 05-09-01 | Finnland-Grikkaland |
| 06-10-01 | Týskland-Finnland |
| 06-10-01 | Ongland-Grikkaland |

## Støðurnar í europeisku bólkunum

**Bólkur 1**

| | d | v - j - t | fyri | ímóti | stig |
|---|---|---|---|---|---|
| Russland | 7 | 5 - 2 - 0 | 10 | 3 | 17 |
| Slovenia | 7 | 3 - 4 - 0 | 11 | 7 | 13 |
| Sveis | 7 | 3 - 2 - 2 | 14 | 6 | 11 |
| Jugoslavia | 6 | 2 - 3 - 1 | 11 | 4 | 9 |
| Føroyar | 6 | 1 - 1 - 4 | 5 | 15 | 4 |
| Luksemburg | 7 | 0 - 0 - 7 | 2 | 18 | 0 |

**Bólkur 2**

| | d | v - j - t | fyri | ímóti | stig |
|---|---|---|---|---|---|
| Írland | 8 | 5 - 3 - 0 | 18 | 5 | 18 |
| Portugal | 7 | 4 - 3 - 0 | 18 | 5 | 15 |
| Holland | 7 | 4 - 2 - 1 | 21 | 8 | 14 |
| Estland | 7 | 2 - 1 - 4 | 8 | 14 | 7 |
| Kypern | 7 | 2 - 1 - 4 | 10 | 22 | 7 |
| Andorra | 8 | 0 - 0 - 8 | 4 | 25 | 0 |

**Bólkur 3**

| | d | v - j - t | fyri | ímóti | stig |
|---|---|---|---|---|---|
| Danmark | 7 | 4 - 3 - 0 | 13 | 5 | 15 |
| Kekkia | 7 | 4 - 2 - 1 | 10 | 3 | 14 |
| Bulgaria | 7 | 4 - 2 - 1 | 12 | 7 | 14 |
| Ísland | 7 | 3 - 1 - 3 | 11 | 10 | 10 |
| Norðurírland | 7 | 1 - 1 - 5 | 6 | 11 | 4 |
| Malta | 7 | 0 - 1 - 6 | 2 | 18 | 1 |

**Bólkur 4**

| | d | v - j - t | fyri | ímóti | stig |
|---|---|---|---|---|---|
| Svøríki | 7 | 5 - 2 - 0 | 13 | 1 | 17 |
| Turkaland | 7 | 4 - 3 - 0 | 13 | 6 | 15 |
| Slovakia | 7 | 3 - 2 - 2 | 7 | 6 | 11 |
| Makedonia | 7 | 1 - 3 - 3 | 9 | 10 | 6 |
| Aserbadjan | 7 | 1 - 1 - 5 | 2 | 13 | 4 |
| Moldova | 7 | 0 - 3 - 4 | 2 | 13 | 3 |

**Bólkur 5**

| | d | v - j - t | fyri | ímóti | stig |
|---|---|---|---|---|---|
| Póland | 7 | 5 - 2 - 0 | 16 | 6 | 17 |
| Hvítarussland | 7 | 3 - 3 - 1 | 8 | 7 | 12 |
| Ukraina | 7 | 2 - 4 - 1 | 7 | 7 | 10 |
| Wales | 7 | 0 - 5 - 2 | 7 | 9 | 5 |
| Noreg | 7 | 0 - 4 - 3 | 5 | 8 | 4 |
| Armenia | 7 | 0 - 4 - 3 | 6 | 12 | 4 |

**Bólkur 6**

| | d | v - j - t | fyri | ímóti | stig |
|---|---|---|---|---|---|
| Belgia | 6 | 4 - 2 - 0 | 23 | 5 | 14 |
| Kroatia | 5 | 3 - 2 - 0 | 10 | 2 | 11 |
| Skotland | 5 | 3 - 2 - 0 | 10 | 3 | 11 |
| Letland | 7 | 1 - 1 - 5 | 4 | 14 | 4 |
| San Marino | 7 | 0 - 1 - 6 | 3 | 26 | 1 |

**Bólkur 7**

| | d | v - j - t | fyri | ímóti | stig |
|---|---|---|---|---|---|
| Spania | 6 | 4 - 2 - 0 | 15 | 4 | 14 |
| Eysturríki | 5 | 3 - 2 - 0 | 7 | 3 | 11 |
| Ísrael | 6 | 3 - 1 - 2 | 10 | 5 | 10 |
| Bosnia-Hersegovina | 5 | 1 - 1 - 3 | 7 | 10 | 4 |
| Liktinstein | 6 | 0 - 0 - 6 | 0 | 16 | 0 |

**Bólkur 8**

| | d | v - j - t | fyri | ímóti | stig |
|---|---|---|---|---|---|
| Italia | 6 | 5 - 1 - 0 | 15 | 3 | 16 |
| Rumenia | 6 | 4 - 0 - 2 | 7 | 6 | 12 |
| Ungarn | 5 | 2 - 2 - 1 | 13 | 7 | 8 |
| Georgia | 5 | 1 - 0 - 4 | 6 | 10 | 3 |
| Litava | 6 | 0 - 1 - 5 | 3 | 18 | 1 |

**Bólkur 9**

| | d | v - j - t | fyri | ímóti | stig |
|---|---|---|---|---|---|
| Týskland | 6 | 5 - 1 - 0 | 13 | 5 | 16 |
| Ongland | 5 | 3 - 1 - 1 | 7 | 3 | 10 |
| Grikkaland | 6 | 2 - 0 - 4 | 4 | 10 | 6 |
| Finland | 5 | 1 - 2 - 2 | 5 | 6 | 5 |
| Albania | 6 | 1 - 0 - 5 | 5 | 10 | 3 |